# Handilsskúlin

*Lærugreinakunngerð* *Februar 2000*

## Spanskt E

*Endamálið*

**1.** Endamálið er, at næmingurin verður førur fyri at lesa og skilja eyðskiltar spanskar tekstir, fær venjing í munnligum málfimi og fatan av talaðum sponskum. Harafturat skal næmingurin gjøgnum arbeiðið við tekstunum fáa kunnleika til mentanarviðurskifti í Spania og Latínamerika.

*Undirvísingin*

**2.** Næmingurin skal læra at
a) skilja einfalt spanskt mál í skrift og talu,
b) duga at málbera seg einfalt munnliga og skrivliga um vinnulig og almenn viðurskifti,
c) læra um mentarnarligar munir millum Føroyar og spansktmælt lond, og
d) læra at brúka orðabøkur og aðrar hjálparmiðlar, t.d. teldu.

*Innihaldið í undirvísingini.*

**3.1** Lisnar verða 40 normalsíður av tillagaðum tekstum um spansktmælt lond. Harumframt kunnu filmar, ljóðbond og myndir nýtast sum stuðlandi tilfar. Ein pultstími við hesum miðlum verður í pensumuppgevingunum roknaður sum 1,5 normalsíða, tó í mesta lagi 6 normalsíður.

**3.2** Skrivliga arbeiðið skal stuðla tí munnliga málburðinum og skal málsliga og innihaldsliga vera eitt natúrligt framhald av dagliga arbeiðinum við tekstunum og á tann hátt hjálpa næminginum at skilja orðatilfarið og málsliga bygnaðin í tí spanska málinum.

**3.3** Skrivliga arbeiðið fer fram lutvíst heima og lutvíst í flokkinum. Skrivliga heima-arbeiðið fevnir um 5 smærri uppgávur, sum lærarin rættar og ger viðmerkingar til, umframt venjingaruppgávur, sum natúrliga hoyra til byrjanartekstirnar.

*Próvtøkan.*

**4.1** Hildin verður ein munnlig próvtøka, ið fevnir um próvhoyring í einum lisnum og einum ólisnum teksti. Fyrireikingartíðin er umleið 20 minuttir, og tá er vegleiðing og tilfarsútflýggjan íroknað. 3 próvtakarar verða próvhoyrdir um tíman, íroknað próv-døming.

4.2 Næmingar, ið fara til próvtøku eftir vanligum treytum, geva upp 30 normalsíður.

4.3 Fyri sjálvlesandi og næmingar, sum fara til próvtøku eftir serligum treytum, er próvtøkupensum 40 normalsíður.

4.4 Til fyrireiking og próvhoyring skal próvtakarin fáa útflýggjað rein eintøk av teimum tekstútgávum, sum eru givnar upp i próvtøkupensum, umframt ólisna tekstin. Í fyrireikingarrúminum kann próvtakarin nýta egnar uppskriftir og teir orðalistar, sum eru útflýggjaðir í sambandi við undirvísingina, umframt orðabøkur og allar teir tekstir, sum eru tilskilaðir í próvtøkupensum.
Til tess at styðja framløguna kann próvtakarin undir próvhoyringini brúka tær uppskriftir, hann hevur gjørt í fyrireikingartíðini, men eitt beinleiðis handrit til upplesturs telur ikki uppeftir í dømingini.

4.5 Próvhoyrarin velur ólisna tekstin, sum fevnir um 200-300 orð, harav fyrra helvt skal umsetast, meðan tikið verður saman um restina á føroyskum. Ólisni teksturin skal hava ein inngang á føroyskum ella donskum. Í umsetingarpartinum kunnu orðatýðingar verða tilskilaðar.
Partur av lisna tekstinum, ið skal hava eitt hóskandi torleikastig og vavi, verður lisin upp og verður brúktur som støði undir eini samtalu á sponskum.

4.6 Í dømingini av málførleikanum verður størri dentur lagdur á, at næmingurin kann samrøða á einføldum sponskum, heldur enn um allir staklutir eru rættir.

4.7 Givið verður 1 próvtal fyri avrikið. Próvtalið verður givið við støði í eini heildarmeting.